Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinna

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Bygdaleiðir og Eysturoyartunnilin

Spurningar:

1. Er arbeiðið at skipa fleiri túrar hjá Bygdaleiðum úr Klaksvík og gjøgnum Eysturoyartunnilin byrjað?
2. Nær kann væntast, at nýggj ferðaætlan er tøk?
3. Hvussu nógv ferðandi vóru við Bygdaleiðum í 2023 sammett við 2022?

Viðmerkingar:
Landsstýrsmaðurin hevur upplýst í svari til undirritaðu (LM 52-011/2023), at Strandferðslan er farin undir átak at fáa fleiri ferðafólk at ferðast við Bygdaleiðum og at betra tænastuna hjá Bygdaleiðum sum heild.

Í samband við spurning mín í august 2023 um, nær ætlanin er at skipa fleiri túrar hjá Bygdaleiðum úr Klaksvík gjøgnum Eysturoyartunnilin, upplýsti landsstýrismaðurin: "Tá ið Sandoyartunnilin letur upp, er ætlanin eisini at gera hóskandi tillagingar, soleiðis at Eysturoyartunnilin í framtíðini verður gagnnýttur betri til koyringina millum Norðoyggjar, Eysturoy og Suðurstreymoy."

Nú er Sandoyartunnilin tikin í nýtslu, men enn hevur onki verið alment at frætt um, hvørjar tillagingar verða gjørdar, og nær væntast kann, at hesar verða settar í verk. Tí verður hesin spurningur tikin framaftur.

At ferðslan hjá leið 400 er skipað uttanum Eysturoyartunnilin merkir, at tey ferðandi brúka ein tíma eyka aftur og fram, hvørja ferð tey fara til Havnar ella Klaksvíkar.

Í dagsins samfelag ynskja fólk at ferðast stytstu leið, og harumframt er tað dýrari fyri SSL og umhvørvið at koyra longstu leið. Her eru meirútreiðslur til brennievni, størri útlát og meira slit á vegirnar. Harumframt er tað ikki gott fyri umhvørvið, at stórir bussar við fáum ferðafólkum verða nýttir til henda flutning.

Við ársbyrjan metti Strandferðslan, at tað fór at verða ein vøkstur í ferðafólkatalinum í 2023 á umleið 10-15%. Nú árið er runnið hevði verið áhugavert at fingið upplýst, hvussu henda meting helt.

Fyri at fáa greiðu á, hvussu gongur við ætlanum landsstýrismansins, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 10. januar 2024

Eyðgunn Samuelsen